# Upp og niður í Danmark

*Superliga: Komandi vikuskifti skal Herfølge vísa, um teir framvegis skulu roknast millum liðini, sum kunnu vinna DM*




*Jákup Mikkelsen, sum her sæst í dysti móti AaB, var leygardagin óheppin at meiða sær álbogan í dysti móti AGF*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Danska kappingin verður í vár mett at vera so óstøðug, sum hon nevyan nakrantíð hevur verið áður.

Eitt umfar var á skránni skírisdag og aftur eitt páskadag. Herfølge tapti 1–0 í Viborg skírisdag, og tað hevði við sær, at Brøndby fyri fyrstu ferð síðani vetrarsteðgin kom á odda. Sunnudagin fekk Herfølge eitt stig fyri 1–1 á heimavølli móti AGF, og tá Brøndby samstundis tapti stórt í Lyngby, hevði tað við sær, at Herfølge aftur er á odda – teir eru eitt stig frammanfyri Brøndby.

Komandi sunnudag hittast Brøndby og Herfølge á Brøndby stadion. Í Danmark verður mett, at um Herfølge framvegis skal hava møguleika at vinna DM, so skulu teir fáa stig í Brøndby.

Tað ber yvirhøvur ikki til at rokna seg fram til, hvørt av hesum báðum liðunum fer at vinna, tí tað er eyðkent bæði fyri Brøndby og Herfølge, at avrikini og úrslitini hjá teimum eru sera óstøðug.

**Jákup óheppin**

Føroyski landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, var óheppin bæði í Viborg, og tá AGF vitjaði í Herfølge.

Tá Herfølge tapti 1–0 í Viborg, varð mett, at Jákup kundi havt vart fyri einasta málinum. Føroyingurin tøvdi eitt evarska lítið sindur, áðrenn hann fór móti bóltinum, og so var ein álopsmaður fyrri á, sneiddi framvið Jákupi, sum var langt úti í brotsteiginum, og trillaði bóltin í netið.

Páskadag søplaði Herfølge sigurin burtur á heimavølli móti AGF. Jákup Mikkelsen stóð væl í málinum 1. hálvleik, tá Herfølge kom á odda 1–0, men í steðginum gjørdist tað greitt, at tað var neyðugt at seta eykamálverjan Claus Udengaard, á vøllin í 2. hálvleiki.

Jákup Mikkelsen varð undir upphitingini skaddur í ælboganum. Spenningurin í Herfølge snýr seg nú um, um málverjin verður tøkur, tá teir sunnudagin skulu spæla toppdyst í Brøndby.

**FCK av tindinum og í dalin**

Mest óstøðuga liðið í superliguni er ivaleyst FCK. Eina ferð vísa teir so flótandi og gott fótbóltsspæl, sum einki annað lið í superliguni, og næstu ferð er eingur dugur í teimum. Óstøðuga lagið ger seg eisini galdandi í einstøku dystunum. FCK spælir væl eina løtu, og so hongur einki saman næstu løtuna.

Skírisdag smurdu teir Silkeborg av 4–1. Tað var ein kærkomin sigur, spælið hekk væl saman, og Todi Jónsson stóð so sterkur í myndini, at hann bæði av sjónvarpinum og onkrum av bløðunum varð settur á liðið, sum teir velja aftaná hvørt umfarið.

Páksadag vóru allir møguleikar hjá FCK at styrkja um sína støðu í kappingini um eitt pláss í Europa Cup, men tað miseydnaðist fullkomuliga. FCK var á odda 1–0 í góða várveðrinum í Parkini, men so gekk tað av skriðuni, og botnliðið úr Vejle vann 4–1. Allir í FCK vórðu sagdir at hava tað, teir kalla ein off day, og Todi Jónsson varð skiftur út, tá tað restaðu 22 minuttir.

Komandi vikuskifti skal FCK spæla á útivølli móti AB.

JH

## Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 30.04 | AB-FC København |
| 30.04 | AGF-Esbjerg |
| 30.04 | Vejle-Lyngby |
| 30.04 | Viborg-OB |
| 30.04 | Brøndby-Herfølge |
| 01.05 | AaB-Silkeborg |

*Dystirnir um páskirnar vóru hesir:*

**Skírishósdag**

| | |
|---|---|
| Aab-Esbjerg | 7-1 |
| FCK-Silkeborg | 4-1 |
| AGF-Lyngby | 3-0 |
| Viborg-Herfølge | 1-0 |
| Brøndby-Vejle | 4-0 |
| AB-OB | 0-2 |

**Páskadag**

| | |
|---|---|
| OB-Aab | 1-4 |
| Lyngby-Brøndby | 3-0 |
| Esbjerg-Viborg | 1-2 |
| Silkeborg-AB | 1-0 |
| Herfølge-AGF | 1-1 |
| CK-Vejle | 1-4 |

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 26 | 13 | - | 5 | - | 8 | 39 | 37 | 2 | 44 |
| 2 | Brøndby | 26 | 12 | - | 7 | - | 7 | 46 | 30 | 16 | 43 |
| 3 | Viborg | 26 | 12 | - | 6 | - | 8 | 39 | 36 | 3 | 42 |
| 4 | AaB | 26 | 10 | - | 11 | - | 5 | 46 | 28 | 18 | 41 |
| 5 | Silkeborg | 26 | 11 | - | 7 | - | 8 | 42 | 28 | 14 | 40 |
| 6 | Lyngby | 26 | 12 | - | 4 | - | 10 | 41 | 37 | 4 | 40 |
| 7 | AB | 26 | 10 | - | 8 | - | 8 | 37 | 30 | 7 | 38 |
| 8 | FCK | 26 | 10 | - | 4 | - | 12 | 36 | 31 | 5 | 34 |
| 9 | OB | 26 | 7 | - | 9 | - | 10 | 24 | 33 | -9 | 30 |
| 10 | AGF | 26 | 7 | - | 7 | - | 12 | 27 | 38 | -11 | 28 |
| 11 | Vejle | 26 | 5 | - | 10 | - | 11 | 30 | 53 | -23 | 25 |
| 12 | Esbjerg | 26 | 6 | - | 4 | - | 16 | 26 | 51 | -25 | 22 |



# Tríggir skulu telva um FM

*Talv: Fyri fyrstu ferð nakrantíð skal FM fyri einstaklingar avgerast í umdysti millum tríggjar telvarar*



*Avgerðin um, hvør skal hava steypini, er enn ikki fallin. Tríggir telvarar eru nevnliga ájavnir á fyrsta plássinum, og neyðugt er nú við umdysti til tess at finna nýggjan føroyameistara*

Eingin avgerð fall páskaaftan um, hvør skal bera heitið FM vinnari fyri einstaklingar í talvi í ár 2000.

John Rødgaard var eitt hálvt stig undan trimum undan síðsta umfarinum. John hevði seks stig, og Flóvin Þór Næs, Torbjørn Thomsen og Eyðun Nolsøe høvdu fimm og eitt hálvt stig í part.

Eyðun Nolsøe fekk javnt móti FM vinnaranum 1999, Heina Olsen, meðan Flóvin og Torbjørn vunnu á ávikavíst Martini Brekká og Herlufi Hansen, og so endaðu tríggir telvarar á seks og einum hálvum stigi.

– Tað er fleiri ferðir áður komið fyri, at tveir telvarar hava staðið javnir, tá kappingin hevur verið liðug. Men hetta er fyrsta ferðin, at tríggir telvarar hava verið javnir, tá kappingin hevur verið liðug.

Hetta staðfestir, Rani Nolsøe, sum er stak væl nøgdur við FM kappingina, sum í páskafrítíðini var í Eydnuni á Oyrabakka.

Rani Nolsøe veit ikki at siga okkum, nær teir tríggir fara at telva um, hvør skal vinna FM:

– Vit hava ikki gjørt nakra avtalu við telvararnar. Nú fara vit at spyrja teir, nær tað passar teimum best at telva. Teir búgva ikki allir í Føroyum, og tí rokni eg ikki við, at umdysturin verður nú beinanvegin. Men kanska verður hann um einar tveir mánaðir. Vit fara fyrst at spyrja teir í Sundalagnum, um teir vilja taka á seg í samstarvi við Talvsambandið at skipa fyri umdystinum. Um tað liggur fyri hjá teimum, so verður dysturin í Eydnuni. Um tað ikki liggur fyri hjá teimum, so finna vit eina aðra loysn, sigur Rani Nolsøe.

Tá tveir telvarar hava luttikið í umdystinum, hava teir onkuntíð telvan fýra talv, og onkuntíð hava teir telvað tvey talv.

Rani Nolsøe sigur, at teir hava ikki enn gjørt av, hvussu umdysturin skal ganga fyri seg. Hetta fara teir í Talvsambandinum at tosa um innanhýsis, og so fara teir eisini at tosa við telvararnar:

– Tað eru fleiri møguleikar. Ein møguleiki er, at teir telva eitt talv móti hvørjum øðrum. Hetta ber tann fyrimunin í sær, at tað fer at bera til at avgreiða umdystin eftir einum vikuskifti. Vansin við hesi skipanini verður tann, at teir fara at hava hvíta ella svarta fólkið. Um vit semjast um, at teir skulu telva tvey talv móti hvørjum øðrum, so telva teir eina ferð við hvíta fólkinum og eina ferð við svarta fólkinum móti hvørjum øðrum. Vansin við hesi skipanini verður, at tað fer at taka meiri enn eitt vikuskifti at avgreiða kappingina. Men nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður, sigur Rani Nolsøe.

**Ólavur dragnaði**

Tá fimm umfør vóru telvað, var tað Ólavur Simonsen, sum lá undir liðini á John Rødgaard í kappingini um fremsta plássið. Men í seinnapartinum av kappingini var úrtøkan hjá Ólavi soltnari, enn hon var í fyrra partinum.

Lyklatalvini hjá Ólavi vóru í sætta og áttanda umfarinum, tá hann við svarta fólkinum tapti móti Flóvini Þór Næs og Eyðuni Nolsøe. Harvið misti Ólavur møguleikan at blanda seg í toppin. Í níggjunda umfarinum hevði javna talvið hjá honum móti John Rødgaard við sær, at hesin seinni nevndi ikki einsamallur endaði á toppinum.

Sum vit søgdu í síðstu viku, so misti meistarin frá 1999, Heini Olsen, eitt fet beinanvegin, tá hann tapti móti John Rødgaard. Úrslitið hjá Heina Olsen – eitt sætta pláss – er tað lakasta, síðani hann í 1989 fyrstu ferð luttók í meistarabólkinum.

Merkisvert er, at Heini Olsen í seks av teimum níggju talvunum fekk eitt hálvt stig, meðan hann bara tapti móti John Rødgaard.

**Komu aftanífrá**

Eyðun Nolsøe fekk eina syndarliga byrjan, tá hann tapti tvær ferðir. Síðani gekk sum eftir ánni hjá Eyðuni, sum var sera tryggur og telvaði við stórum sjálvsáliti. Móti Heina Olsen endaði tað í síðsta umfarinum javnt, men frammanundan hevði Eyðun vunnið seks talv á rað. Harvið gjørdist FM vinnarin í 1995 eitt hálvt stig ov stuttur til at blanda seg í kappingina millum teir tríggjar fremstu.

Flóvin Þór Næs var undan kappingini mettur sum ein av møguleikunum at vinna FM, meðan Torbjørn Thomsen var mettur sum ein out sidari. Felags fyri teir báðar var, at teir høvdu stóra úrtøku seinnapartin av kappingini. Í áttanda umfarinum endaði innanhýsis uppgerðin teirra millum javnt, og í síðsta umfarinum vunnu teir báðir sannførandi.

Vit nevndu í blaðnum í síðstu viku, at nógv bendi á, at Flóvin Þór Næs fór at vinna talvið móti Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum í fyrstu atløgu varð sagt at vera javnt, og soleiðis var tað.

**Hinir bólkarnir**

Í almenna bólkinum var ungi havnarmaðurin, Martin Poulsen, sera sannførandi. Hann fekk sjey og eitt hálvt stig av átta møguligum. Hetta varð mett sum eitt stak gott úrslit, og tað verður við spenningi sæð fram ímóti, hvussu tað fer at roynast hjá Martini í framtíðini. Einasta hálva stigið, sum hann misti, var móti Helga Joensen av Toftum.

Næstfremst í almenna bólkinum vóru tríggir gøtumenn. John Joensen, Reinhold Isaksen og Jákup F. Joensen fingu allir fimm og eitt hálvt stig. Blaðungi Olaf Berg, sum í 1999 vann unglingadeildina, megnaði at fáa fýra og eitt hálvt stig.

Í unglingabólkinum vann Jákup D. Joensen úr Havnar Telvingarfelag FM. Hann fekk sjey av átta stigum. Næstfremstur var Rúni Dragaberg úr Klaksvíkar Talvfelag. Hann fekk seks stig. Rúni var eisini næstbestur í 1999.

Í veteranbólkinum endaðu tveir javnir á fremsta plássinum. Teir vóru Árni M. Dam úr talvfelagnum Róki, og Júsinus Hansen úr Tofta Talvfelag.

JH



*Sætta plássið hjá Heina, er lakasta úrslit hansara, síðani hann í 1989 kom upp í landsliðsbólkin*

**Meistarabólkurin**

**Mikudagin – 6. umfar**
Carl Eli Nolsøe Samuelsen – Heini Olsen 0–1
Flóvin Þór Næs – Ólavur Simonsen 1–0
Herluf Hansen – Eyðun Nolsøe 0–1
Rani Nolsøe – Torbjørn Thomsen 0–1
John Rødgaard – Martin Brekká 1–0

**Skírisdag – 7. umfar**
Ólavur Simonsen – Herluf Hansen 1–0
Eyðun Nolsøe – John Rødgaard 1/2 – 1/2
Heini Olsen – Flóvin Þór Næs 1/2 – 1/2
Torbjørn Thomsen – Carl Eli Nolsøe Samuelsen 1–0
Martin Brekká – Rani Nolsøe 1–0

**Langa fríggjadag – 8. umfar**
Herluf Hansen – Heini Olsen 1/2 – 1/2
Eyðun Nolsøe – Ólavur Simonsen 1–0
Flóvin Þór Næs – Torbjørn Thomsen 1/2 – 1/2
Carl Eli Nolsøe Samuelsen – Martin Brekká 1–0
John Rødgaard – Rani Nolsøe 1/2 – 1/2

**Páskaaftan – 9. umfar**
Torbjørn Thomsen – Herluf Hansen 1–0
Heini Olsen – Eyðun Nolsøe 1/2 – 1/2
Ólavur Simonsen – John Rødgaard 1/2 – 1/2
Martin Brekká – Flóvin Þór Næs 0–1
Rani Nolsøe – Carl Eli Nolsøe Samuelsen 1–0

**Støðan eftir níggju umfør**

| | | |
|---|---|---|
| John Rødgaard | 6 1/2 | stig |
| Flóvin Þór Næs | 6 1/2 | stig |
| Torbjørn Thomsen | 6 1/2 | stig |
| Eyðun Nolsøe | 6 | stig |
| Ólavur Simonsen | 5 1/2 | stig |
| Heini Olsen | 5 | stig |
| Rani Nolsøe | 3 1/2 | stig |
| Herluf Hansen | 2 | stig |
| Martin Brekká | 2 | stig |
| Carl E. N. Samuelsen | 1 1/2 | stig |